Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Steffan Klein Poulsen, løgtingsmaður

Svarari: Uni Rasmussen, landsstýrismaður í fíggjarmálum

Evni: Asfaltering við atløgubryggjuna í Hvannasundi

Spurningar:

1. Nær verður byrjað at asfaltera við atløgubryggjuna í Hvannasundi?
2. Verða parkeringsbásar eisini gjørdir í hesum sambandi?
3. Væntar landsstýrismaðurin, at ásetta upphædd røkkur til arbeiðið?

Viðmerkingar:
Fíggjarnevndin setti 500 tús. kr. av á fíggjarlógini til asfaltering við atløgubryggjuna í Hvannasundi. Hetta økið verður brúkt til parkering hjá fólki, sum fara til Svínoyar og Fugloyar. Onkrar árstíðir standa rættiliga nógvir bilar parkeraðir har og oftani uttan skil orsakað av manglandi parkeringsbásum (linjum). Í eitt nú páskahøgtíðini er tiltikið, at nógv fólk fara til áðurnevndu útoyggjar, og tá standa bilarnir parkeraðir sum sild í tunnu. Asfaltering og parkeringsbásar kundu óivað bøtt nógv um hetta.

Á Løgtingi, 15. mars 2022

Steffan Klein Poulsen